## Tíggju millióna tíðindi

At lesa tíðindi í sjónvarpinum er uttan iva eitt rímiliga vællønt starv, men nú slær Natasha Kaplinsky øll met. Nú hon flytir frá »Six O'Clock News« hjá BBC til »Five News with Natasha Kaplinsky« fær hon samstundis eina lønarhækkan, so hon frameftir fer at forvinna eina millión pund um árið, og tað svarar til góðar tíggju milliónir krónur. Men tað er ikki fyri pengarnar, at hon nú skiftir arbeiðsgevara, tí hon er gift einum múgvandi bankamanni. Tað skrivar enska blaðið The Times.



## Stuðlar nú Obama

Chefstrategurin hjá Bill Clinton til valið í 1992, James Carville, hevur vent Hillary Clinton bakið og stuðlar nú Barack Obama. – Kenslan av, at Hillary Clinton ikki kann tapa er endaliga burtur, og tapir hon í antin Texas ella Ohio, kann hon tað sama gevast, sigur Carville. Somu áskoðan hevur ein annar valstjóri hjá Bill Clinton í 1992, David Wilhelm. Hann valdi longu frá fyrsta degi av at ráða fólki til at velja Obama heldur enn Hillary Clinton, og hóast hann bert er ein maður og bert hevur eina atkvøðu, so hevur hansara meining stóran symbolskan týdning, skrivar Berlinske.

# So gekk kabalin upp

**Eftir nógvar blandingar gekk kabalin hjá samgonguni loksins upp. Men ikki meiri enn so, at neyðugt verður at blanda kortini av nýggjum á hvørjum ári, so leingi samgonguskeiðið varar**

NEVNDARBÝTI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Vónandi verður bururin hjá forkvinnu Tjóðveldis á tingi, Annita á Fríðriksmørk, lættari enn semjan um samgongu og nevndarbýti millum Javnað, Tjóðveldi og Miðflokkin var.

Tað vísti seg nevniliga, at báðir av teimum stóru samgonguflokkunum hildu seg hava eina avtalu um, at teirra flokkur skuldi fáa fíggjarnevndarformannin, og tí mátti tingfundurin, sum varð settur klokkan hálvgum tíggju gjáramorgunum, leggjast niður, meðan tær seinastu samráðingarnar millum flokkarnar fóru fram.

Miðflokkurin var sum so ikki partur av hesum seinastu telvingunum, tí teir høvdu longu framman undan fingið sítt upp á tað turra.

Loksins fann mann so fram til eina rættiliga salomonska loysn, har flokkarnir bara samdust um at býta alt millum sín, so at Javnaðurin fekk fíggjarnevndarformannin fyrsta og triðja árið av samgonguskeiðinum, meðan Tjóðveldi í somu tíðarskeiðum fekk tveir limir í fíggjarnevndini, formannin í landsstýrismálanevndini umframt lim samgongunnar í Norðurlandaráðnum.

Umvent fær Tjóðveldi so formannin í fíggjarnevndini annað og fjóðra árið í samgonguskeiðinum, meðan Javnaðarflokkurin so fær hinar sessirnar hesi árini.

### Heini kompenseraður

Hvussu so hesir báðir flokkarnir hava telvað innanhýsis, er ein annar spurningur. Tað er óivað onkur, sum hevur hug at undrast á, at tað gjørdist nývalda Eyðgunn Samuelsen, sum gjørdist forkvinna í fíggjarnevndini.

Har vóru aðrir møguleikar, ein teirra Gerhard Lognberg, ið jú fekk eitt sera gott val. Men hinvegin kundi hesin postur til hann givið ábendingar um, at hetta var ein kompensatión fyri útsetan av Sandoyartunlinum.

Ein annar møguleiki var John Johannesen, men tá hann er valdur til formann fyri tingbólkin, kundi hann ikki fáa fíggjarnevndarformanssessin eisini.

Hinvegin er eingin ivi um, at Heini O. Heinesen hevur fingið kompensatión fyri ikki at verða valdur til fiskivinnumálaráðharra. Hann hevur fingið sæti í bæði fíggjarnevndini og í vinnunevndini, møguliga við tí fyri eyga, at fáa formanssessin í fíggjarnevndini annað ella bæði árini, Tjóðveldi eigur henda sess.

Tað kundi eisini verið líkt til, at Tjóðveldi á sín vís hevur kompenserað Heidi Petersen fyri ikki at gerast landsstýriskvinna í mentamálum. Hon fær í hvussu er formanssessin, sum tilfall Tjóðveldi, umframt varasessin í Norðurlandaráðnum fyrsta árið, væl vitandi at fasti limurin, Sjúrður Skaale, fer á fólkating, og harvið sigur sessin í Norðurlandaráðnum frá sær ta tíðina. Hartil fær hon eisini sess í mentanarnevndini.



*Heini O. Heinesen gjørdist ikki fiskimálaráðharri, men fekk nevndarsess bæði í fíggjarnevndini og vinnunevndini afturfyri*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Nevndirnar við varalimum síggja soleiðis út, fyrst nevnd verða formenn/-kvinnur (nevndirnar skipa seg sjálvar, so áðrenn hesar hava havt nevndarfund, eru formenn/-kvinnur bert tilnevnd):**

**Fíggjarnevndin**
*Fastir limir:*
Eyðgunn Samuelsen C
Anfinn Kallsberg A
Heini O. Heinesen E
Páll á Reynatúgvu E
Kári á Rógvi D
Tordur Niclasen H
Magni Laksáfoss B

*Varalimir:*
Mikkjal Sørensen C
Jørgen Niclasen A
Heidi Petersen E
Sjúrður Skaale E
Kári P. Højgaard D
Jenis av Rana H
Kaj Leo Johannesen B

**Uttanlandsnevndin**
*Fastir limir:*
Jenis av Rana H
Jørgen Niclasen A
John Johannesen C
Bjørn Kallsø B
Sjúrður Skaale E
Olga Biskopstø E
Kári á Rógvi D

*Varalimir:*
Tordur Niclasen H
Jákup Mikkelsen A
Andrias Petersen C
Johan Dahl B
Bergtóra Høgnadóttir Joensen E
Heidi Petersen E
Kári P. Højgaard D

**Landsstýrismálanevndin**
*Fastir limir:*
Heidi Petersen E
Annika Olsen A
Andrias Petersen C

*Varalimir:*
Heini O. Heinesen E
Jacob Vestergaard A
Eyðgunn Samuelsen C

**Vinnunevndin**
*Fastir limir:*
Johan Dahl B
Heini O. Heinesen E
Gerhard Lognberg C
Páll á Reynatúgvu E
Jákup Mikkelsen A
Jacob Vestergaard A
Kári P. Højgaard D

*Varalimir:*
Bjørn Kallsø B
Bergtóra Høgnadóttir Joensen E
Mikkjal Sørensen C
Olga Biskopstø E
Poul Michelsen A
Annika Olsen A
Kári á Rógvi D

**Trivnaðarnevndin**
*Fastir limir:*
Jørgen Niclasen A
Bergtóra Høgnadóttir Joensen E
Andrias Petersen C
Annika Olsen A
Rósa Samuelsen B
Kaj Leo Johannesen B
Tordur Niclasen H

*Varalimir:*
Poul Michelsen A
Páll á Reynatúgvu E
Katrin Dahl Jakobsen C
Jákup Mikkelsen A
Alfred Olsen B
Johan Dahl B
Bill Justinussen H

**Mentanarnevndin**
*Fastir limir:*
Bill Justinussen H
Sjúrður Skaale E
Heidi Petersen E
Katrin Dahl Jakobsen C
Bjørn Kallsø B
Edmund Joensen B
Jógvan á Lakjuni A

*Varalimir:*
Jenis av Rana H
Olga Biskopstø E
Páll á Reynatúgvu E
Andrias Petersen C
Alfred Olsen B
Rósa Samuelsen B
Annika Olsen A

**Rættarnevndin**
*Fastir limir:*
Jacob Vestergaard A
Poul Michelsen A
Edmund Joensen B
Alfred Olsen B
Mikkjal Sørensen C
Olga Biskopstø E
John Johannesen C

*Varalimir:*
Annika Olsen A
Jógvan á Lakjuni A
Magni Laksáfoss B
Rósa Samuelsen B
Eyðgunn Samuelsen C
Bergtóra Høgnadóttir Joensen E
Gerhard Lognberg C

Umframt føstu løgtingsnevdirnar vóru eisini valdir limir í Norðurlandaráðið og í Útnorðurráðið.

**Norðurlandaráðið**
*Fastir limir:*
Sjúrður Skaale (samg.)
Kaj Leo Johannesen (andst.)

*Varalimir:*
Heidi Petersen (samg.)
Kári P. Højgaard (andst.)

**Útnorðurráðið**
*Fastir limir:*
Andrias Petersen C
Bergtóra Høgnadóttir Joensen E
Poul Michelsen A
Magni Laksáfoss B
Kári P. Højgaard D
Jenis av Rana H

*Varalimir:*
John Johannesen C
Páll á Reynatúgvu E
Jógvan á Lakjuni A
Alfred Olsen B
Kári á Rógvi D
Bill Justinussen H

At enda kunnu vit nevna landsgrannskoðararnar fyri komandi fýra árini:
Annita á Fríðriksmørk E
Anfinn Kallsberg A
Kaj Leo Johanesen B
Mikkjal Sørensen C